# Pedagogur

## til frítíðaransingina í Runavíkar kommunu

Søkt verður eftir pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna í frítíðaransingini í Runavíkar Kommunu. Frítíðaransingin, sum er skipað undir Kommunalu Barnaansingini, er normerað til 30 børn.

Vit ynskja at tú ert kreativ/ur, hevur góð samstarvsevnir og hevur hug at arbeiða við børnum.

Starvið verður at seta 1. september 2001, ella eftir nærri avtalu.

Um ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá leiðaranum á tlf. 256930.

Skrivlig umsókn skal vera Kommunalu Barnaansingini í hendi í seinasta lagi 23/07-2001.

**Kommunala Barnaansingin**
Heiðavegur
600 Saltangará

---

**Til Hvannasunds Kommunalu Dagrøktarskipan verður við hesum søkt eftir:**

# leiðara við námsfrøðiligari útbúgving

at byrja skótast gjørligt. Talan er um hávltíðarstarv.

**Lønar- og setanartreytir** eru sambært sáttmálan við Føroya Pedagogfelag, lønarfl. 15, stig 20-24.

**Fleiri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Gunvør Eliasen kommunuskrivara á telefon 452007.

**Umsóknir** vera at senda til:

**Hvannasunds Kommunu**
740 Hvannasund

og skulu vera kommununi í hendi **í seinasta lagi 20. juli 2001.**

---

# Summarfrí

Skrivstovan er stongd frá 23. juli til 20. august 2001.

**FØROYA JARÐARRÁÐ**
fax 311185 • teldupostur: fj@fj.fo

---

# Kunngerð

**frá útskiftingarnevndini fyri Hvalvíkar bygd**

Næsti útskiftingarfundur verður í róðrarneystinum í Streymnesi fríggjadagin 20. juli kl. 13.30.

Ætlaða kommunala ognartøkan og fyribilsplantur verða framløgd.

**Matrikulstovan,**
tann 2. juli 2001

---

# Kunngerð

**frá útskiftingarnevndini fyri Kunoyar bygd**

Næsti útskiftingarfundur verður í Kunoy týsdagin 17. juli kl. 10.30.

Metingin av bønum og fyribilsplanur fyri býtið uttangarðs verða framløgd.

**Matrikulstovan,**
tann 4. juli 2001

---

# Útbjóðing

Fyri Tórshavnar kommunu verður arbeiðið at víðka kirkjugarðin við Velbastaðvegin í Tórshavn hervið boðið út alment.

Arbeiðið fevnir um útgrevstur, spreinging, dren og uppfylling. Økið er umleið 14000 fermetrar. Harafturat verður nakað av útgrevstri v.m. í sambandi við ringvegin út á Argir.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til undirritaðu.

Lisitatiónin verður á teknistovuni, Lucas Debesargøta 11, mánadagin 6. august í ár, kl. 16.00.
Teir bjóðandi kunnu tá vera hjástaddir.

**Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, arkitektar**
Lucas Debesargøta 11
110 Tórshavn
tlf. 313696 · fax 316488

---

# NetCafé Orion

Í sambandi við at NetCafé Orion møguliga fer at keypa nýggjar teldur, verða núverandi teldur seldar fyri spott prísir.

Talan er um 12 teldur, sum verða seldar fyri 7.000,- pr. stk, skunda tær og ring um tú ætlar at ogna tær eina teldu fyri hendan spott prís.

**NetCafé Orion**
Tlf. 216676

---

# Fiskivinnuroyndir

**Lýst verður eftir verkætlanum at menna virking og sølu av vørum burtur úr upsa**

Á játtanini til Fiskivinnuroyndir 2001 er peningur (1,0 mió. kr.) ætlaður til verkætlanir at menna virkingarhættir og sølu av vørum virkaðum burtur úr upsa. Játtanin er ætlað sum trý-ára átak.

Áhugað (fyritøkur, stovnar ella einstaklingar), sum hava ætlanir ella hugskot um, hvussu meira kann fáast burtur úr upsatilfeinginum við mentum virkingarhættum og sølu av vørum úr upsa, og sum tørva stuðul til fremjan av ætlanini, verða við hesum boðin at søkja um stuðul av givnu játtanini.

Umsóknir um stuðul verða viðgjørdar av stýringsbólkinum, sum mótvegis Fiskimálastýrinum skal tryggja, at stuðlaðar verkætlanir eru á høgum fakligum støði og eru til frama fyri vinnuna sum heild. Stýringsbólkurin fer at leggja dent á, at verkætlanir byggja upp kunnleika um marknað og sølu við serligum atliti at vørum úr upsa ella byggja á slíkan kunnleika.

Umsóknir verða latnar Menningarstovuni, sum fyribils hevur leiðsluna av stýringsbólkinum. Umsóknir verða skrivaðar á umsóknarblaði saman við teimum eyka skjølum og viðmerkingum, sum umsøkjari heldur tørva at lýsa verkætlanina nóg væl. Umsóknarblað fæst við at venda sær til Menningarstovuna. Umsóknarfreistin er 1. august 2001.

**Menningarstovan**
Postrúm 259
110 Tórshavn
Tlf. 31 30 28
Fax 31 04 59
e-postur: kjkr@trade.fo

---

# Umsjónarfólk søkist

Søkt verður eftir umsjónarfólki til Hvalvíkar kommunu, at byrja 01. september 2001.

Talan er um eitt fulltíðarstarv og tann, sum settur verður, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at tilrættarleggja arbeiðið.

Arbeiðið umfatar alt fyrifallandi arbeiði hjá kommununi, so sum at taka sær av øllum ognunum hjá kommununi, viðlíkahaldsarbeiði/umvælingum/nýgerð o.a.

Útbúgving ella roynd ur innan fyri handverk er ein fyrimunur, tó eingin treyt.

Løn eftir avtalu.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 01. august 2001.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Zachariasen, borgarstjóra, tlf. 422382 ella 212843.

**Hvalvíkar kommuna**



# Summarfrí

Sagt skal verða frá, at Almanna- og heilsumálastýrið er afturlatið vegna summarfrí í tíðarskeiðnum frá 9. juli til 27. juli 2001. Opið verður aftur sum vanligt mánadagin 30. juli 2001. Tó ber til at ringja á tlf. 30 40 50 millum kl. 9.00 og 15.00

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Eirargarður 2
100 Tórshavn

---

# Mála og pussa

Hví mála og pussa, tá ið tú kanst gera bæði í einari arbeiðsgongd. Skalsem puss og máling. Eisini havi eg Skalflex máling á goymslu.

Nærri fæst at vita við at ringja til

**Arni Samuelsen**
Tlf. 455775
Klaksvík

---

# Haldórsvíkar Skúli

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv við Haldórsvíkar Skúla fyri skúlaárið 2001/2002.

Starvið er 9 tímar um vikuna. Tann, ið verður settur, má kunna undirvísa í heimkunnleika og handarbeiði.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi leygardagin 21. juli.

**Haldarsvíkar skúlanevnd**
v/ Tórhild Hansen
438 Langasandur

---

# Útbjóðing

Vegna Tórshavnar Kommunu verður við hesum arbeiðið at gera kloakkreinsiverk við Sersjantavíkina boðið út alment.

Arbeiðið fevnir um samanbinding av kloakkum frá Jónas Bronckssgøtu og Djóna í Geilsgøtu, gerð av kloakkreinsiverki við yvirrenningarskipan og íbindingum við og gerð av inspektiónstunli til kloakktunnil frá Havnará.

Útbjóðingartilfarið fæst til láns frá teknistovu okkara móti kr. 5.000 í veðhaldi við at boða frá áðrenn týsdagn 10. juli 2001. Upphædding skal setast inn á konto 9181.173.908.7. Tilboð skulu latast inn til Tórshavnar Kommunu, Teknisku deild, í seinasta lagi hósdagin 27. juli 2001 kl. 15.00, tá innkomin tilboð verða opnað. Tey bjóðandi kunnu vera hjástødd.

**Martin E. Leo Sp/f,** ráðg. verkfrøðingar
Tórsgøta 24, postbox 1024
Tlf. 311488, fax 315488, m-e-leo@post.olivant.fo
110 Tórshavn

---

Fiskirannsóknarstovan

# Royndarfiskiskapur

Í ár er peningur tøkur til hesar fiskiroyndir:

1. Royndir við flotlínu eftir hýsu
2. Royndir við rist í flatfiskatroli
3. Royndir á landleiðini við trolbustum

Reiðarí, ið kundu hugsa sær at luttikið í omanfyri nevndu royndum, kunnu frætta nærri við at venda sær til:

**Fiskirannsóknarstovuna**
Nóatún 1
Postboks 3051
110 Tórshavn

tlf. 31 50 92, fax 31 82 64

---

# Søkt verður eftir framleiðsluleiðara

Vit søkja eftir einum framleiðsluleiðara til mjøldeildina á Havsbrún. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
Ábyrgd av framleiðsluni av fiskamjøl og lýsi, herundir ábyrgdina av:

- operatørum og framleiðslustarvsfólkum
- støðugt at optimera framleiðsluna
- at framleiðslutólini eru í góðum standi
- at góðskukrøvini verða hildin
- at menna framleiðslu og góðsku á lidnu vørunum

Vit rokna við at tú hevur

- eina holla, tekniska útbúgving
- kunnleika til maskinur og teldur
- góð samstarvsevni

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 13. august 2001. Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkum.

HAVSBRÚN
**Pf. Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 414400 · Fax 414401
Mail: bep@havsbrun.fo

---

Søkt verður eftir

# dagrøktarmammu

at byrja 20. august, fyribils í hálvt ár.

Umsóknir skulu vera dagrøktini í hendi seinast 16. juli.

**Dagrøktarskipanin**
í Sjóvar Kommunu
490 Strendur

---

# Fiat Multipla



árg. 01/00, til sølu fyri 154.000,-, koyrt 18.700, (nýprísur 190.000).

Skal síggjast, og roynast.

**Tlf. 22 15 63 / 44 88 77**

---

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstova okkara stongd í tíðarskeiðnum 9. juli til 6. august. Vaktartelefonin svarar á tel. 350 350.

**VIT sp/f**
Tórsgøta 16
Tel. 350350

---

# Til sølu

Lítil, fittur 1 1/2 ára gamal Daewoo Matiz L, hevur koyrt umleið 15.000 km, sera økonomiskur og er sum nýggjur. Prísur 70.000 kr.

**Tlf. 319489 ella 219489**

---

# PRÝÐISLUTIR

VIÐ MOTIVUM ÚR NORRØNU GUDALÆRUNI




Anker Eli Petersen hevur designað eina spennandi røð av prýðislutum við motivum úr norrønu gudalæruni. Her eru 2 motiv - fleri eru at velja ímillum.

Prýðislutirnir verða latnir í gávueskju við fittligum bóklingi um hvønn einstakan prýðislut.

Eitt frálíkt **gávuhugskot** - til studentin, føðingardagsbarnið, konfirmantin...

3arin

SMS · Tel 353535 · Fax 353536 · www.3-arin.com · 3-arin@3-arin.com